# 2005 - hendingar, meiningar og myndir

Blaðútgávan av Sosialinum, sum tygum halda í hondini í dag, er nummar 251 í hesum árinum. Sosialurin kemur út í blaðútgávu hvørt gerandiskvøld, og tíðindini er sum oftast skrivað sama dag. Tað er tí eitt feskt blað, sum stóri parturin av Føroyum fær inn um hurðina um kvøldini.

Sosialurin flutti fyrr í ár í nýggja Miðlahúsið í Vágsbotni, men blaðið hevur í ár sum nógv undanfarin ár gjørt nógv við at koma út kring landið til tiltøk og hendingar. Sosialurin hevur blaðfólk í fleiri býum og bygdum kring landið, og tað styrkir munandi um blaðið. Í Klaksvík er redaktión, og í Sandvík starvast eitt av blaðfólkunum hjá blaðnum. Harafturat eru onnur blaðfólk úti um landið knýtt at blaðnum á ymsan hátt, og við tveimum bilum ber til at koma út til stóran part av landinum eftir stuttari tíð. Harafturat hevur Sosialurin eisini fólk uttanlands, sum eru knýtt at blaðnum, og tað gevur blaðnum enn eina dimensjón.

Tað sæst aftur í Sosialinum, at blaðið er úti um seg, og vit halda eisini, at hetta er ein styrki, sum Sosialurin hevur fram um nógvar av hinum miðlunum í landinum. Sosialurin er fólksins blað, og tað merkja vit eisini á blaðnum. Áhugin fyri blaðnum sera stórur kring alt landið.

Fyrr í ár gjørdi Sosialurin av at flyta av Argjum og inn í hjartað á Havnini, har nýggja Miðlahúsið í Vágsbotni er blivið ein livandi partur av høvuðsstaðnum. Í Miðlahúsinum verður blaðútgávan av Sosialinum framleidd, og redaktiónin framleiðir eisini tíðindi til aðrar miðlar - til dømis til mest lisnu føroysku heimasíðuna, Portalin. Miðlahúsið í Vágsbotni roynir støðugt at menna Sosialin og hinar miðlarnar, sum Miðlahúsið veitir tænstur til, og tað eru eisini nýggj hugskot og nýggir tankar til komandi árið.

Umframt at framleiða tíðindi til føroyingar virkar Miðlahúsið í Vágsbotni eisini sum eitt livandi mentanarhús, har smærri konsertir, fyrilestrar, kjakfundir og annað verður hildið. Húsið er sera væl egnað til tiltøk av hesum slagnum, og áhugin fyri at koma í Miðlahúsið til tónleik, kjak ella fyrilestrar hevur verið sera stórur. Miðlahúsið liggur í hjartanum á Havnini, og vit halda, at hetta eisini forpliktar okkum at bjóða húsið fram til mentan og annað.

Umframt at framleiða Sosialin 251 ferðir í hesum árinum, hevur Sosialurin eisini gjørt fleiri onnur bløð, sum eru komin út saman við Sosialinum. Fótbóltsblaðið við kappingarbyrjan, Páskablað, Jóla- og Nýggjársblaðið, Ólavsøkublaðið og fleiri stevnubløð eru millum tey eykabløð, sum lesararnir hjá Sosialin fáa við í keypinum, tá ið teir halda ella keypa Sosialin.

2005 hevur verið eitt hendingarríkt ár á nógvum økjum, og vit vilja við hesum eykablaðnum tríva í nakað av tí, sum hevur verið frammi í árinum. Hetta er ikki ein roynd at geva eina fullfíggjaða mynd av tí, sum hevur verið frammi, men heldur at taka nakrar søgur fram, sum hava verið við til at mynda føroyska samfelagið - sumt fyri tað góða, og sumt kanska fyri tað minni góða.

Hetta er bert ein lítil brøkpartur av tí, sum hevur verið at finna í teigunum í Sosialinum, men her eru nakrar hendingar, meiningar og myndir, sum vóru frammi í 2005.

**Ger so væl og gott nýggjár!**

Sosialurin




# Á gáttini millum tað farna og tað ókenda

Tað ringasta, sum kann henda, er, at einki hendir. Soleiðis tók stjórin í Norðoya Sparikassa til fyri nakað síðani, tá ið hann varð spurdur um vánirnar hjá klaksvíkingum og norðoyingum og vinnulívinum har norðuri, nú fasta sambandið um Leirvíksfjørð bara er nakrar fáar mánaðir burtur.

Stjórin rakti seymin beint á høvdið. Tá ið tingini standa í stað, ella tá ið talan er um stagnatión, so gongur tað skeiva vegin. Soleiðis er tað í búskapinum, soleiðis er tað í politikkinum, soleiðis er tað í familjunum og sivila samfelagnum yvirhøvur, og soleiðis er tað eisini hjá Sosialinum.

Um vit seta okkum upp aftur á og siga, at nú er slottið vunnið, og nú hava vit tað so gott, at tað ikki er neyðugt at spíla seg út longur, so er deyðin í durðunum. Einki er so víst sum tað.

Fyri einum ári síðani stóðu vit fyri stóru avbjóðingini at flyta úr blaðhúsinum á Argjum og heim í Vágsbotn. 15. apríl flutti Sosialurin heim í Miðlahúsið í Vágsbotni. Tað var rættuliga tilvitað, at vit settu hetta navnið á húsini.

Blaðdeyði er vælkent fyribrigdi í okkara verð. Bløðini, sum eru bukkað undir í hørðu kappingini, hava verið tey, sum hava latið staðið til. Tey hava ikki sæð týdningin í tí, sum sparikassastjórin í Klaksvík tók til eina ferð í hesum árinum. Ella hava tey spent bogan ov høgt og eru hoyknað undir ov stórum byrðum, tí fíggjarliga avkastið ikki gjørdist tað, sum var neyðugt, tá ið lógurnar skuldu afturrindast og raksturin skuldi standa upp og niður.

Síðani Sosialurin flutti í Vágsbotn eru møguleikarnir vornir nógv fleiri. Takið hjá okkum, sum starvast í Miðlahúsinum, er nú at gera nyttu úr møguleikunum. Hvussu hetta skal gerast, verður tað arbeitt við hvønn einasta dag.

Tað er synd at siga, at tað verður leitað eftir hugskotum. Nógv var á listanum, áðrenn flutt varð av Argjum, og undir søguligu lonini í Vágsbotni er nógv sprottið. So at siga dagliga koma input uttanífrá, og í Miðlahúsinum takka vit fyri, at tað eisini í hesum vísir seg at vera gott samband við viðskiftafólkini.

Vit fegnast um, at tað við tiltøkunum í Miðlahúsinum hevur eydnast at gera Sosialin til tann natúrliga partin av miðbýarumhvørvinum, sum vit roknaðu við, at tað skuldi gerast, og vit fegnast um, at havnarfólk, myndugleikarnir, vinnulívið og føroyingar yvirhøvur hava tikið Miðlahúsið til sín. Hópur av fólki – einstaklingar og bólkar – hyggja inn á gólvið, og tá ið skipað verður fyri tiltøkum er áhugin stórur. Tak eitt nú trapputinginí, jólatiltakið og ikki minst ólavsøkutiltakið. Tað verður vónað og roknað við, at hesi tiltøkini fara at verða afturvendandi.

Á gáttini til nýggja árið kunnu vit geva lesarum og lýsarum tað lyftið, at tað framvegis fer at vera lív og nýskapan á Sosialinum og í Miðlahúsinum. Blaðið er kjarnuproduktið. Ynskið er framvegis, at Sosialurin skal vera við kring alt landið, og at fingurin skal vera á pulsinum í so breiðum høpi, sum tað á nakran hátt ber til. Málið er, at hann skal vera í fremstu røð, og starvsfólkini ofra seg fyri at røkka málinum. So verður tað upp til lesarar og lýsarar at gera av, hvussu hetta fer at eydnast.

Hvussu menningin annars fer at verða, fara næstu mánaðirnar at vísa. Takið er at varðveita javnvágina allar vegir. Tað vil siga, at hugflogið og manningarliga og fíggjarliga tilfeingið skulu blandast so skynsamt, sum tað ber til og við tilvitanini, at tað framvegis er soleiðis, sum maðurin segði, at tað ringasta, sum kann henda, er, at einki hendir.

Gott nýggjár og takk fyri gott samstarv í árinum, sum nú er runnið!

**Jan Müller,**
**ábyrgdarblaðstjóri**